Álit

í

løgtingsmáli nr. 19/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin) (Barnafrádráttur til sendifólk og umskipaður pensjónistafrádrátttur)

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 29. september 2023, og eftir 1. viðgerð 5. oktober 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 6. og 9. november 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Endamálið við uppskotinum er býtt upp í tveir tættir. Annar snýr seg um, at sendifólk uttanlands, ið eru fult skattskyldug í Føroyum, skulu hava rætt til barnafrádrátt. Endamálið við hesum partinum av uppskotinum er sostatt at javnseta sendifólk við skattgjaldarar, ið búgva í Føroyum.

Hin snýr seg um, at landið, sum endurgjald fyri lønarlyftið til námsfrøðingar, námsfrøðihjálparar, hjálparfólk, heilsurøktarar og heilsuhjálparar, ið kemur í gildi 1. januar 2024, frameftir fer at rinda allan skattafrádráttin til pensjonistar, sum í dag verður býttur millum land og kommunur. Avtalan um, at landið frameftir fer at rinda allan frádráttin, er gjørd í samráð við stýrið í Kommunufelagnum. Broytta fíggingin av pensjonistafrádráttinum tryggjar, at kommunurnar ikki skulu bera kostnaðin av lønarlyftinum. Henda broyting hevur ongar avleiðingar fyri móttakarar av pensjonistafrádrátti.

<u>Beinir Johannesen, Magnus Rasmussen og Steffan Klein Poulsen hava harumframt hesar viðmerkingar:</u>

At landsstýriskvinnan í fíggjarmálum og Kommunufelagið hava gjørt semju um, at landið rindar allan skattafrádráttin til pensjonistar sum endurgjald fyri lønarlyftið til námsfrøðingar, námsfrøðihjálparar, hjálparfólk, heilsurøktarar og heilsuhjálparar verður tikið fult undir við.

Hinvegin vilja undirritaðu vísa greitt á, at tað merkir ikki, at tikið verður undir við lønarlyftinum til ávísar fakbólkar.

Við hesum ymisku viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 16. november 2023

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Birita Matras Petersen
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	